2 árin Telefon: 311820 Fax: 314720 E-mail: post@sosialurin.fo



# TV2-sangur bara á internetinum

Danski poppbólkurin TV2 brúkar ger sær nú dælt av nýggjari tøknifrøði. Bólkurin hevur útgivið eina nýggja upptøku av sanginum “Sænk mine skibe” á internetinum. Sangurin, sum er upptikin av Danmarks Radio í Århus, kann bara fáast við at leita sær inn á heimasíðuna hjá TV2 og taka sangin haðani. Hetta hevur verið gjørligt síðani týsdagin í hesi vikuni.

# Astrid Lindgren kosin til aldarinnar svia

Rithøvundin Astrid Lindgren varð um ársskiftið kosin at verða aldrinnar svii.

Tað vóru lesarar hjá blaðnum Aftonposten, sum peikaðu á vælumtókta rithøvundin.

92 ára gamla Astrid Lindgren er framvegis væl fyri, men hon sær illa og hevur seinastu árini hildið seg nógv fyri seg sjálva. Mesta av samskiftinum við fjølmiðlar fer fram gjøgnum skrivaran hjá henni.

Millum bestu kendu bøkurnar hjá henni kunnu nevnast Pippi Smokkuleggur og Emil úr Lønniberg.



**Astrid Lindgren er sera væl umtókt millum sviar**

# Kappast um útvarpsrás

Í Føroyum var um reppið, at skrivaðandi fjølmiðil fór í luftina sum Rás 2. Teirri ætlanini spurdist einki burtur úr, men í Danmark eru fleiri av bløðunum sinnað, at standa fyri eini landsdekkandi útvarpsrás.

Tað er pláss fyri einari landsdekkandi útvarprás í Danmark afturat, og bæði Berlingska húsið og Politiken hava givið boð um, at tey eru áhugað í fáa rásina. Eisini TV2 og TV3 eru við í spælindum, og DR heldur seg hava rættin til rásina.

Kappingin harðnast í hvørjum, og tað verður danski mentamálaráðharrin, sum skal taka avgerðina um, hvør skal hava fjórðu rásina.

Hon hevur áður ført fram, at hon vil bróta einkarættin hjá DR til at senda landsdekkandi útvarp.



# William Heinesen verður 100 ár

Leygardagin um eina viku eru tað liðin 100 ár, síðani William Heinesen varð borin í heim.

Rithøvundurin, sum hevur selt nógvar bøkur í útlandinum, var virkin listamaður.

Í sambandi við stóra dagin eru avdúkingar, útgávur og tiltøk á skránni.

Millum annað fer Annika Hoydal at geva út eina fløgu, har hon hevur skrivað tónleik til yrkingar hjá Williami.

**Subject:** Teldubræv
**Date:** Fri. 7. januar 2000
**To:** post@sosialurin.fo
**From:** justinus@t-online.de
**Reply to:** justinus@t-online.de

TELDU-POSTURIN

# Fremmandahatrið í okkum øllum

Orðaskiftið um tey mongu fremmandu, sum seinstu árini eru flutt til vesturheimin, er hart í løtuni. Í Danmørk gongur serliga bonksliga á og flokkar, sum hava sett sær fyri at sáa hatur millum fremmand og donsk, hava góðar dagar. Í einum komandi fólkatingsvali stendur Dansk Folkeparti, við Piu Kjærsgaard á odda, til ein stórsigur. Úti undir vaðingini byrjar haturssáarin mikli, Mogens Glistrup, at remba sær. Hann ætlar sær eisini upp í part og Gud náði tey, sum hava annan húðalit enn donsk, koma hesir mannahatsku politikarar til valdið.

Orðið integrerast finst ikki í tí føroyska málinum. Í nýggjastu Donsk/Føroysku orðabókini er hetta orð umskrivað soleiðis: “Gestaarbeiðarar mugu takast við upp í samfelagið.” Hetta orð verður nógv nýtt í dag, eitt nú í Danmark og nógvar miseydnaðar royndir eru gjørdar fyri at fáa gestaarbeiðarar at fella til sum danir í Danmørk.

Føroyingar hava verið toluliga tolsamir, tá tað snýr seg um at taka væl ímóti fremmandum fólkum. Hyggja vit í telefonbókina, so síggja vit nógv fremmand eftirnøvn, men tey, sum bera hesi eftirnøvn, eru líka føroysk sum øll onnur í Føroyum. Útlendskir tilflytarar eru eftir fáum árum vorðnir broyttir til føroyingar av hørðu vesturættini, føroyska slatrinum, okkara egnu útgávu av jantelógini og eisini av reint praktiskum ørsøkum. Vanliga er tú tað sum loysir seg best at vera og í Føroyum hevur tú tað best, hugsar tú sum ein føroyingur.

Hyggur tú í føroysku telefonbókina, so dettir tú skjótt yvir fremmand eftirnøvn sum Svabo, Winther, Matras, Debes, Krabenhøft, Klein, Restorff, Mohr, Kyster, Kruse, Hentze, Isholm, Sloan, Guðjónsson, Ellefsen, Breckmann, Dam, Claussen, Balle, Birch, Bischoff, Bisp, Lützen, Müller, Pøhlsgaard, Klargård, Manai, Sigurðsson, Slyne, Skoubo, Splidt, Terp, Tetler, Wardum, Ziska o.s.v.

Øll hesi nøvnini stava frá monnum, sum eru fluttir til Føroyar, summir fyri mongum árum síðan, summir nýliga, men felags fyri øll hesi eftirnøvn er, at tey fólk, sum bera hesi, og sum beinleiðis eru í ætt við tilflytararnar, tey eru so føroysk, sum ein kann hugsa sær. Tey eru integreraði í føroyska samfelagið, tey eru tikin við upp í samfelagið. Og nógv av teimum, sum bera hesi eftirnøvn hava verið úrmælingar á so mongum økjum. Fremmand eftirnøvn hava mannað garð um okkara móðurmál og gjørt risaavrik málinum at frama.

Okkurt av hesum eftirnøvnum hevur lyft føroyingin av drýlinum og heilt yvir at wienarbreyðinum, onkur kveikti lív í føroyska andslívið, purraði kirkjuna út, aðrir lærdu føroyingar keypmannslistina og uppaftur aðrir lærdu føroyingar at eta við knívi og gaffli.

Kanska føroyska tolsemi hvat fremmandum viðvíkur kundi lært danir og onnur við nakað, nú fleiri útlendingar búgva í Ishøj enn danir. Trupulleikin er bert tann, útlendingar í Føroyum higartil hava havt rætta húðalitin. Tað hava verið hvítir menn, sum eru fluttir higar, teir allarflestu. Eg veit ikki hvussu hevði verið statt, um føroyingar upplivdu lutfallsliga somu innflyting av ørvísi littum, sum dønum hevur verið fyri seinastu árini.

Tí rasisman rasar eins væl í føroyska samfelagnum og hon ger í tí danska. Eg hoyrdi jødi í negativari merking øll míni barnaár og eg var trøllvaksin maður, áðrenn eg fyrstu ferð sá eina jøda. Grønlendingar fáa hendur ikki altíð so mjúk orð frá okkum føroyingum.

Søgan sigur okkum, at danski óttin fyri útlendingum er ógrundaður, gevur samfelagið teimum møguleikar koma upp í samfelagið. Fyrr hava eisini nógvir gestaarbeiðarar verið í Danmørk og at teir koma úr fremmandum londum, kanst tú bara síggja á teirra eftirnøvnum. Tá jútska heiðin varð velt í farnu øld, fluttu hópin av týskum og hálendskum bøndrum til Danmarkar at dyrka jørðina, íð danir ikki skoyttu um. Teir vóru upptiknir í danska samfelagið. Sama hendi við polskum bønarmonnum og kvinnum, sum arbeiddi á donsku bóndagørðunum.

At útlendingar flyta til eitt samfelag kann gerast ein styrkur fyri samfelagið, um teir fáa røttu karmarnir at arbeiða undir. Men kravið til fremandu fólkini eigur at vera, at tey læra málið og síðan at tey halda tær lógir, sum eru við at bera vælferðarsamfelagið frameftir.

Nøkur av teimum londum, sum eru fyrimyndir hjá okkum i Norðurlondum, eru júst lond har fleiri eitt eitt fólkaslag búgva lið um lið. Eitt nú USA, Ísrael, Bretland og Týskland. Hevði nýggja 21. øld lært okkum, at tolsemi mótvegis øðrum fólkum skapar frið og framgongd, so kundu vit av røttum kallað okkum eina kristna tjóð. Teir tríggir vísu menninir úr Eysturlondum, vóru fremmandir menn, tann miskunsami sámáriubúgvin var fremmandur maður og soleiðis kundu vit blivið við at ferðast í søguni hjá føðingardagsbarninum, sum setir aldur á 21. øld.

vinarliga
Jústinus Eidesgaard
Hamborg



# FØÐINGAR

17. desember fingu Synnøva Hansen og Rógvi Justesen, Klaksvík, eina gentu. Hon var 52 cm long og vigaði 3500 gr.

20. desember fingu Høgnina Vestergaard og Birgir Beck, Vágur, ein son. Hann var 54 cm langur og vigaði 3890 gr.

22. desember fingu Tórfríð Olsen og Joen Pauli Joensen, Froðba, eina dóttir. Hon var 51 cm long og vigaði 3670 gr.

28. desember fingu Súsanna Vang og Jan Møller, Greve, eina dóttir. Hon var 52 cm long og vigaði 3200 gr.

29. desember fingu Rakul Lamhauge og Bárður á Steig Nielsen, Vestmanna, eina dóttir. Hon var 52 cm long og vigaði 3300 gr.

30. desember fingu Eyðna Hammer, Hósvík og Jann Thomsen, Streymnes, ein son. Hann var 51 cm. langur og vigaði 2950 gr.

30. desember fingu Kára á Dunga og Jógvan Højgaard, Tórshavn, eina dóttir. Hon var 55 cm long og vigaði 3950 gr.

31. desember fingu Jastrid Mc Gavin og Háldan Haldansen, Vestmanna, ein son. Hann var 52 cm langur og vigaði 4050 gr.

31. desember Malan N. Samuelsen og Uni Arge, Tórshavn, eina dóttir.

31. desember fingu Pia Marx Larsen og Høgni Hentze, Odense, eina dóttir. Hon var 56 cm. long og vigaði 4354 gr.

1. januar fingu Linda og Dánjal Debes, Oyri, ein son. Hann var 54 cm langur og vigaði 3700 gr.

1. januar fingu Guðrun Debes og Thomar Hermansen, Tvøroyri, ein son. Hann var 53 cm langur og vigaði 3700 gr.

1. januar fingu Gunnleyg og Petur Páll Juul, Eiði, ein son. Hann var 54 cm langur og vigaði 4050 gr.

1. januar fingu Maria og Jens Bech, Skála, eina dóttir. Hon var 53 cm long og vigaði 3600 gr.

3. januar fingu Heidi Kjærbo og Bergur Petersen, Klaksvík, eina dóttir. Hon var 53 cm long og vigaði 3800 gr.

3. januar fingu Tordis V. Jacobsen, Froða og Eyðstein L. Poulsen, Sandvík, eina dóttir. Hon var 53 cm long og vigaði 3970 gr.

4. januar fingu Anna Drangberg og Jógvan Pauli Christiansen, Skála, ein son. Hann var 54 cm langur og vigaði 3900 gr.

4. januar fingu Ásvør Skaalum og Ólavur Gregersen, Tórshavn, eina dóttir. Hon var 56 cm long og vigaði 3600 gr.

6. januar fingu Randi og Birgir Jakobsen, Tórshavn, ein son. Hann var 56 cm langur og vigaði 3750 gr.

# ANDLÁT

31. desember:
**Einar Hansen,** Einar á Brúnni, 83 ár
29. desember:
**Hjalgrím Klein,** Keypmanna, 67 ár
29. desember:
**Áshild Midjord,** Tórshavn, 68 ár
31. desember:
**Einar Hansen,** Einar á Brúnni, 83 ár
31. desember:
**Anna Høgnesen,** Norðoyri, Klaksvík, 76 ár
31. desember:
**Torbjørn Benjardøgg,** Vági, 73 ár
31. desember:
**Elsa Andreasen,** Rituvík, 85 ár
2. januar:
**Richard Poulsen,** Skála, 49 ár
2. januar:
**Poul Engberg Poulsen,** Tórshavn, 78 ár
3. januar:
**Elisabeth Joensen,** Lisa, Miðvági, 88 ár
4. januar:
**Anna D. Petersen,** í Sandavági, 83 ár
5. januar:
**Jóan Karl Absalonsen,** Viðareiði, búsitandi í Moss í Noregi, 96 ár
5. januar:
**Jacobina Berthelsen,** Strendur, 74 ár

# KIRKJUR & SAMKOMUR

## Gudstænastur 1. sunnudag eftir trettanda

*Vesturkirkjan:* kl. 11, Bergur D. Joensen
*Argja kirkja:* kl. 11, Heri Joensen
*Norðskála:* Kl. 11.40, skriftamál, kl. 12 messa, Emil Olsen
*Sandavágur:* kl. 12, Uni Næs
*Funningsfjørður:* kl. 12, altargangur, Peter O.K. Olofson. (Innsavnan til Ytri missión verður í øllum Fuglafjarðar prestagjaldi)
*Hósvík:* kl. 12, Martin R. Jacobsen
*Vágur:* kl. 11, Elsa Funding
*Skálafirði:* kl. 11, Jógvan Fríðriksson
*Húsar:* kl. 12, altargangur, Niels Pauli Danielsen
*Havnar kirkja:* kl. 11, Sverri Steinhólm
*Nólsoy:* kl. 12, altargangur, Bjarni Bæk
*Kaldbak:* kl. 12, altargangur, Sonja Klein
*Skúlin í Lamba:* kl. 11, Jónsvein Bech
*Famjin:* kl. 12, altargangur, Petur M. Rasmussen

## Frá Ebenezer
Sunnudag kl. 12.00 sunnudagsskúli, kl. 18.00 evangeliskt møti og kl. 21.00 útimøti. Mánadag kl. 20.00 bønarmøti.

## Tórshavnar Hvítusunnusamkomu
Sunnudag morgunmøti kl. 11. Kl. 12.15. Sunnudagsskúl. Kl. 18 Evangeliskt møti.

## Samkoman Immanuel
Í kvøld Kongsins Herlið kl. 20.00 8 ár og eldri eru vælkomin.

## Rhema á Hálsi
Sunnudagin. Sunnudagsskúli kl. 13.00. Sunnukvøldið møti kl. 19.00.

## Losjan í Havn Tinghúsvegur 18
Januar: 6. 13. 20. 27.
Februar: 3. 10. 17. 24. Mars: 2. 9. 16. 23. 30.
Apríl: 6. 13. 27. Mai: 4.

## Filadelfia, Landavegur 22
Í kl. 06.00 morgunbøn, kl. 17.00 landsbøn, í morgin kl. 06.00 morgunbøn, kl. 11.00 morgunmøti, kl. 18.00 møti. Mánadagin kl. 06.00 morgunbøn, kl. 20.00 bønarmøti. Týsdagin kl. 06.00 morgunbøn.

## Meinigheitin í Hoyvík
Sunnudagin í Hoyvíkar skúla, sunnudagsskúlin kl. 14.00, kl. 17.30 er bøn og kl. 18.00 møti har Elly Durhuus o.a. kvinnur verða við. Verið øll hjartaliga vælkomin. Vit eru við í tiltakinum frá Minus til Pluss.

## Frelsunarherurin í Tórshavn
Sunnudagin kl. 11.00. Halgunarmøti. Kl. 13.30. Sunnudagsskúli. Kl. 17.30 Bøn. Kl. 18.00. Møti. Majorene Turid og Knut Gamst.

## Betel Vágur
Sunnudagin: Breyðbróting kl. 11.00. Sunnudagsskúli kl. 13.30. Evangeliskur fundur kl. 18.00. Mánadagin: Bønarfundur kl. 20.00.

## Samkoman, Sion Vági
Sunnudag: Morgunmøti kl. 11.00, kl. 11.30: Sunnudagsskúli. Evangeliskt møti kl. 18.00.
Telefonandaktin svarar á 373777.

## Missiónshúsið í Porkeri
Møti í kvøld kl. 20.00 og sunnukvøldið kl. 18.00. Talarar eru: Niklas Mikkelsen og Petur Magnusson. Øll eru hjartaliga vælkomin.

## Meinigheitshúsið á Tvøroyri
Sunnudagin verður sunnudagsskúli kl. 14.00. Sunnukvøldið kl. 18.00 verður møti við Kaj Eyvindson. Innsavnan verður til húsið. Øll eru hjartaliga vælkomin.

## Missiónsvikan í Kvívík
Missiónsvikan verður í Glæmuni í Kvívík 6.-9. jan. Leygarkvøldið kl. 20.00 talar Niels Jacob Nielsen, Gittit syngur, og Elsi Christiansen endar. Sunnudagin kl. 12.00. Gudstænasta kl. 14.30. Sunnudagsskúli. Og kl. 18.00, talar Regin Høgnesen, Gullakk og Jónhilda syngja, og Reimund Langgard endar. Innsavnan til Heimamissiónina sunnukvøldið. Øll eru hjartaliga vælkomin.

## Meinigheitshúsið á Skála
Sunnudagin kl. 13.30 ungdómsmøti og kl. 19 møti.

## Keldan, Skálafirði
Í kvøld kl. 21, opið hús. Sunnudagin kl. 17 møti við Paula Høj, barnamøti kl. 17.

## Elim, Søldarfjørður
Í kvøld kl. 20.00. Møti fyri ung og eldri. Á skránni er nógvur sangur og kvinnur úr samkomuni luttaka. Kl. 22.00. Ungdómsmøti, øll eru hjartaliga vælkomin. Drekka verður ímillum møtini.

## Nebo, Toftir
Á fundinum sunnudagin luttaka Erla og Ingvard Petersen og Susan og Øssur Berghamar.

## Evangeliskt møti í Runavík
Evangeliskt møti verður sunnudagin kl. 17.00 og iki leygardagin, sum áður lýst. Húsmøti verður týsdagin kl. 20.00 hjá Jonnu & Palla Højgaard, Saltangará. Telefonandakt er á nr. 449914. Palli Højgård & Charles Johansen.

## Kristnastova
Birmavej 36, København S, tlf. 32 55 18 09
fax. 32 58 61 49
e-mail:
kristnastova@get2net.dk
Kristiligur fundur er hvørt fríggjakvøld kl. 20.
Møti við breyðbróting er hvønn sunnumorgun kl. 11. Sunnudagsskúli er samstundis.
Bussarnir 5, 9, 12, 13, 37, 38 steðga nærhendis.

## Føroyskt barnamøti
Hvønn mánadag kl. 17 er føroyskt barnamøti í »Fælles Fælleshuset« á C. W. Obel kollegium á Herningvej. Øll eru hjartaliga vælkomin.

## Føroysk møti
Føroyskt møti eru triðja leygardag í hvørjum mánaði kl. 19 í hølunum hjá Bethania kirkjuni á Dag Hammerskjølds Gade 2. Drekkamuður er aftaná, øll eru hjartaliga vælkomin.

## Sunnudagsskúli í Keypmannahavn
Sunnudagsskúli er hvønn sunnudag kl. 14 á Oyrasundskollegiinum, Dalslandsgade, og í Eliaskirkjuni, Vesterbrogade 49. Øll eru hjartaliga vælkomin. Meira fæst at vita frá Jan Johannessen,
tlf. (0)43623737-1502.

## Læknavaktir

**Tórshavn:**
*Læknavaktin* tlf. 310033.

**Eysturoy:**
*Leygardag 8. jan.:* Andreas Petersen, tlf. 441086
*Sunnudagin 9. jan.:* Magnus á Stongum, tlf. 423006

**Norðoyggjar:**
Jaspur Petersen, tlf. 456400

**Vágar:** tlf. 332413

**Suðuroy (norður):**
Tlf. 371560

**Suðuroy (suður):**
Tlf. 373030

## Tannlæknavakt, Tórshavn
Bráðfeingishjálp fæst leygardag, sunnudag og halgidagar kl. 13–14. Tlf. 314544.

## Prógv
**Á Tekniska Skúla í Thisted, hevur Jóan Petur Bjarkhamar úr Vági, búsitandi í Hanstholm, lokið prógv sum maskinsmiður.**

## 85 ár
**Mánadagin 10. januar verður Jógvan Jacobsen, Vestmanna, 85 ár.**
**Dagurin verður hildin saman við børnunum.**

## Brúdleyp
**Í dag 8. januar kl. 15.00 giftast í Ebenezer, Valbjørg Steintún, Sørvágur og Hanus Gaard, Tórshavn.**
**Veitslan verður í Pálsstovu kl. 19.00.**